90 SEKUND

LAGT TIL RÆTTIS: Uni Arge

# HERI JACOBSEN

# Kanska skuldi eg bara **verið** í ALS



MYND: ÁLVUR HARALDSEN

HANN HOYRIST HVØNN **FRÍGGJADAG** Í SENDINGINI **ÁLVARATOS** Í ÚTVARPINUM, OG HANN SKILIR IKKI, AT **BILL JUSTINUSSEN** KALLAÐI SENDINGINA **SKRÆPA**, TÍ HANN HELT **TINGMANNIN** VERA SO **SIÐILIGAN.** UM HANN KUNDI **BROYTT** NAKAÐ Í **FØROYUM**, HEVÐI HANN BROYTT **SKATTIR** OG AVGJØLD, TÍ TAÐ **LOYSIR** ALS IKKI AT **ARBEIÐA.** - EG HEVÐI **FINGIÐ** MEIRA BURTURÚR Í **ALS**, SIGUR **HERI JACOBSEN**, LÆRARI OG **VIÐMERKJARI**

**Hevur veturin verið tungur?**
Nei, veturin hevur ikki verið tungur. Av tí, at eg koyri millum bygdir til arbeiðis, síggi eg so nógvan frálíkan kava, sum lýsir alt landið upp. Náttúran er eisini so frágera vøkur at koyra ígjøgnum, eisini um veturin, at ringt er at gerast tungur í huga.

**Hvussu eru reaktiónirnar upp á Álvaratos?**
Fólk hava tikið óvanliga væl ímóti sendingini. Tey siga, at tað, sum sagt verður, er júst tað, tey sjálv ganga og hugsa. Sendingin hevur verið eitt sindur humoristisk, men tað álvarsama kann saktans verða borið fram við humori. Annars hevði tað verið keðiligt at lurtað eftir.

## Dámar tær væl at siga tína hugsan um samfelagsmál?

Ja, tað geri eg. Samfelagið hevur altíð havt mín áhuga, so tað fellur mær lætt at hava eina meining um tingini. Sum tíðirnar eru, hugsi eg tó ofta, at tað er løgið, sum tingini verða framd. Mangt er paradoksalt.

**Hvat dámdi tær, at tingmaður kallaði Álvaratos skræpa?**
At tingmaður sigur so, ber brá av, at hann er desperatur eftir at verða sæddur og hoyrdur. Hann hevði ivaleyst hildið tað verið løgið, um eg segði tað sama um hansara politikk. Løgið var tað, tí eg havi altíð hildið Bill verið so sinniligan og siðiligan.

**Tú hevur lætt lyndi. Hvaðani stavar tað?**
Lyndið havi eg lætt, tað er púra rætt. Tað kemur úr øllum ættum. Familjurnar í báðar ættir eru lættar av lyndi, so eg havi verið heppin at standa mitt ímillum, tá gávurnar vórðu býttar út. Tað finnast onnur roks í familjunum enn eg!

**Tú ert útbúgvin lærari. Hvat er ein góður lærari?**
Ein góður lærari er ein, ið sær, um ein næmingur hevur tørv á hjálp og stuðlar, hóast hann ikki er biðin um at hjálpa.

**Er føroyski fólkaskúlin ein góður skúli?**
Fólkaskúlin er super, tí tankin um skúlan er so góður. Tá tað so ikki riggar, sum tað skal, kemst tað ofta av, at okkurt ella fleri av liðunum svíkja.

**Hvat kann gerast betri í fólkaskúlanum?**
Fólkaskúlin hevði verið betri, um lurtað varð eftir, hvat øll hava at siga, ikki minst grasrøturnar. Teir nýggju frískúlarnir eru sprotnir úr grasrótunum.

## Hvat heldur tú um føroyskan politikk?

Føroyskur politikkur er ein vavgreytur, sum illa finst skil á. Poul Michelsen ger helst tað rætta við at røra í grýtuni av nýggjum.

**Hvat hevði tú broytt í Føroyum, um tú kundi?**
Tað hevði verið skattir og avgjøld. Tað loysir seg als ikki at stríðast og strevast fyri at fáa nógva og góða løn. Tað hevði loyst seg best hjá mær at farið í ALS í eitt ella tvey ár, tí tá hevði eg havt næstan líka nógv eftir og alla ta frítíð, mær lysti.

**Hvør var stuttligari í Fólksins Rødd, Sonhard ella Ingi?**
Sonnard var MEGA stuttligur - serliga á Hvonn Live. Ingi tykir mær heldur álvarsamur, men hann hevði sanniliga stuttligar viðmerkingar og ákoyringar.

## FAKTA

**Navn:** Heri Jacobsen
**Aldur:** 45 ár
**Útbúgving:** Lærari og serlærari í orðblindni
**Starv:** Hvalvíkar skúli